## Ísland hevur svarað ES

ES fekk í gjár svar upp á teir mongu spurningarnar, sum samveldið sendi íslendsku stjórnini, tá Ísland bað um samráðingar um limaskap í samveldinum. Morgunblaðið skrivar, at íslendska svarskrivið er meiri enn 2.600 síður stórt. Harafturat koma fylgiskjøl, og við teimum er talan um 8.870 síður tilsamans, skrivar blaðið. ES-nevndin fer nú at kanna svarini, og niðurstøðan hjá nevndini verður so løgd fyri ríkis- og stjórnarleiðararnar, sum so skulu taka støðu til, um Ísland lýkur treytirnar sum formligur umsøkjari.



## Færri ferðsluskaðar

Hóast teir donsku fjølmiðlarnir javnan siga frá søgum um skilaleysar bilførarar, vísa hagtølini, at færri fólk fáa skaða í donsku ferðsluni nú enn fyrr. Blaðið JydskeVestkysten skrivar í dag, at níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár fingu 3.744 fólk skaða í ferðsluóhappum. Tað er 17 prosent færri enn í somu mánaðum í fjør og tað minsta í fleiri ár, skrivar blaðið. Sambært Rådet for Større Færdselssikkerhed fáa færri fólk til gongu og færri fólk á prutli skaða í ferðsluni nú. Eisini hava átøk ímóti rúsdrekka-koyring hava sína jaligu ávirkan, skrivar JydskeVestkysten.



*Tað var soleiðis, at tá ið eg einaferð kom hendan vegin... at ein býur sum London er ein góð avbjóðing. Tað var nakað, sum eg vildi upprunaliga. Eisini tá mann hevur áhuga í ar fáa sær útbúgvingina her og praktisera her... tað gevur nakað eyka, tí at tað er London. Tað er líka sum eitt heilt serligt stað*

*Maður, 29, lesandi, 5. árið í London*

# Føroyinga

**Kanningin »Førleiki í útlegd«, ið Rógvi Absalonsen, sum er í starvsvenjing á føroysku sendistovuni í London hevur gjørt vísir, at føroyingar í Bretlandi yvirhøvur kenna ein sterkan samleika við Føroyar. – Hetta kemst helst av, at føroyskir útisetar í Bretlandi yvirhøvur eru ungir, og hava verið stutta tíð í Bretlandi, metir Rógvi Absalonsen**

ÚTISETAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Rógvi Absalonsen úr Havn er í løtuni í praktikk á føroysku sendistovuni í London, og eitt av krøvunum er, at hann skal skriva ein uppgávu, meðan hann er har. Hann hevur tí valt at gera eina kanning av føroyskum útisetum í Bretlandi.

- Eg havi altíð havt stóran áhuga í føroyingum, sum fara uttanlands í lestrarørindum, og tí var tað upplagt at mín uppgáva skuldi snúgva seg um tað. Eg havi sjálvur verið útiseti, og helt at tað kundi verið áhugavert at gjørt hesa kanningina, og eg havi rynt at gjørt hana so umfatandi sum gjørligt, sigur Rógvi Absalonsen.

Verkætlanin viðgerð hugburðir, samleikar og framtíðarætlanir hjá føroyskum útisetum í Bretlandi. Rógvi Absalonsen staðfestir, at høvuðsorsøkin til, at føroyingar flyta til Bretlands, eru lestrarørindi.

Talið av lesandi, ið velja at útbúgva seg í Bretlandi, er vaksandi, og tað hongur í stóran mun saman við avgerðini hjá Stuðulsstovninum í 2002 at hækka ÚSUN (Útbúgvingarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond) upp í 120.000 krónur.

Kanningin vísir, at føroyingar hava eitt ynski um at búgva uttan fyri Føroyar, meðan teir lesa. Føroyingar flyta í stóran mun til Bretlands at lesa fyri at »royna nakað nýtt« og eisini sæst, at føroyingar klára seg væl, bæði í arbeiði og undir lesnaði, og hava lætt við at finna seg til sættis og trívast í nýggjum sosialum umhvørvi.

*Eg búgvi í London, og tað er ikki akkurát tað sama, sum at búgva aðrastaðni í Bretlandi. Hetta er ein mega stórur býur (...) og mær dámar væl, tí at tað er ógvuliga internationalt. Fólk koma allastaðni frá*

*Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London*

### Norðurlendskan samleika

Kanningin vísir, at tað eru trý mál, umframt starvsmøguleikar, sum útisetar eru srliga misnøgdir við, og sum hava stóra ávirkan á avgerðina um bústað í framtíðini.

Eitt er, at samfelagið er konservativt, eitt er, at tað er ov dýrt at ferðast ti log úr Føroyum og eitt er, at bústaðarviðurskiftini ikki eru nøktandi.

- Hinvegin kenna føroyingar ein sterkan føroyskan samleika, men samstundis menna teir eisini ein norðurlendskan samleika. Hetta kemst uttan iva av, at serliga í London er eitt altjóða samfelag savnað, og tá tú hittir kinverjar ella indarar har, ið koma frá londum við hundraðtals milliónum og milliardum íbúgvum, so duga hesir illa at ímynda sær eitt samfelag við færri enn 50.000 íbúgvum. Tí verður lættari at kalla seg norðurlending í slíkum støðum, heldur Rógvi Absalonsen.

Men tað, sum eyðkennir føroyskar útisetar í Bretlandi, er, at teir í fyrsta lagi